## Jógvan Sverrason Biskopstø
## f. 1970



Jógvan Biskopstø lærdi á ungum árum til timburmann og bátabyggjara í Havn, síðan gekk leiðin til Danmarkar á designskúla og listaskúla, áðrenn hann fór á China National Academy of Art í Hangzhou í Kina. Innímillum hevur hann eisini tikið skeið í metal, silvuri, trædreying og sveising.

**Kíkurin, 2004**

Millum mongu verkini, Jógvan Biskopstø hevur latið úr hondum, er *Kíkurin* frá 2004. *Kíkurin*, ið er hugsaður sum ein "ósitandi" stólur, er gjørdur úr einum uppblástum, turkaðum maga á grindahvali, ið fyrr var nýttur sum bjølgur (boya). Púra óvæntað bresta dreyaðar timburkúlur út úr kíkinum, so at yvir flýtur. Kúlurnar sipa til náttúrubornu skapini, sum endurtaka seg sjálv og skapa aðrar heildir í náttúruni. Skapið á kíkinum er fast og kúput, og tað lívrunna tilfarið hóskar væl saman, tá hugsað verður um litin, og hevur ein heitan brúnligan dám. Listamaðurin hevur hjúklað um smálutirnar, og eftir stendur verkið sum ein sonn handverkslig perla, samstundis sum at fagurfrøðiliga dygdin kennist aftur í verkinum. Ein ventilur er í botninum til at pumpa luft í kíkin og vísir soleiðis til bjølgin.



Jógvan S. Biskopstø, *Kíkurin* 2004

♥ Finn myndina og set kross: ☐

♥ Hevur tú nakrantíð smakkað grind og spik? ja ☐ nei ☐

♠ Er ein kíkur? magin á grindahvali ☐ ein, sum etur nógv ☐

♠ Hvussu nógvar kúlur sært tú í kíkinum? 23 ☐ 28 ☐ 31 ☐

♦ Úr hvørjum tilfari eru kúlurnar?

♦ Veitst tú, hvat annað endamál magin á hvali varð brúkt til?

♣ Heldur tú, at *Kíkurin* er ein standmynd?

♣ Lýs verkið stutt við tínum egnu orðum?